

# Terji Rasmussen: - Nólsoy er mín addressa, inntil eg doyggi

**Tónleikarin Terji Rasmussen hevur keypt hús úti í Nólsoy, og er hann serstakliga vælnøgdur við umstøðurnar úti í lítlu oynni. Sosialurin hevur hitt nólsoyarbúgvan á máli um lívið úti í Nólsoy**

SAMRØÐA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

**Blaðmaður:** Hvussu bar tað til, at tú flutti frá stóra Keypmannahavn og út til Nólsoynna?

**Terji Rasmussen:** Tað var trupult at fáa nakað at búgva í Havnini, og tað var ringt at fáa børnini passaði í Havnini. So eg fór til Nólsoyar, og eg havi síðani funnið útav, at eg trívist óluksáliga væl her úti. Eg minnist, tá eg var lítil, so hugsaði eg ofta, at tað mundi vera deiligt at búgva úti í Nólsoy. Og so hevur man verið her úti av og á, bara nakrar tímar, og mær dámdi so ótrúliga væl. So tann tankin um, at tá man einaferð skuldi seta seg niður, so hevði tað kanska verið gott úti í Nólsoy.

**Blaðm.:** Hvat fært tú tíðina at ganga við úti í oynni?

**Terji:** Tað er ongin trupulleiki at fáa tíðina ganga. Man gongur og vitjar onkran, so slappar man av, gløðir út á sjógvin, gongur sær ein túr. Og eg spæli guitar av og á. Men altso um man hevur tendens til at keða seg, so er Nólsoy kanska ikki tað rætta staðið at flyta til, men eg eri ikki tað slagið, sum keðir seg.

**Blaðm.:** Hvussu hava nólsoyingar tikið ímóti tær?

**Terji:** Tey hava tikið øgiliga væl ímóti mær. Tey hava verið ógvuliga blíð og fitt og fyrikomandi. Tey ynsktu mær bara vælkomin, og blíðskapurin var í hæddini. Man skal bara innordnað seg eftir umstøðunum, tí tað er eitt sindur øðrvísi her enn til dømis í Havnini. Man skal líkasum venja seg við rútmuna her.

**Blaðm.:** Tú saknar ikki stórbýarlívið?

**Terji:** Nei. Men onkuntíð kemur tað sjálvandi yvir meg, at nú hevði tað verið gott at farið í býin í Havnini. Men so fari eg bara í býin í Havnini, tað er ikki meira at snakka um tað.

**Blaðm.:** Hvat er miðpunktið í lívinum hjá Nólsoyingum?

**Blaðm.:** Tað er helst í Kaffistovuni, at man kemur mest í samband við hini fólkini. Men Kaffistovan er ikki eitt slíkt stað, har man gongur regluliga. Tað er meira í vikusiftunum, fríggjakvøld og leygarkvøld. Annars er tað teir somu eldru mennirnir, sum sita har í ein tíma ella tveir. Tað er ongantíð tað stóra fólkið at síggja mitt í viku. Men í vikuskiftunum er altíð stúgvandi fult av fólki í Kaffistovuni, og hýrurin er altíð góður. Viðhvørt verður harmonikan tikin fram. Og tað er komið fyri, at eg havi spælt.

**Blaðm.:** Hvussu er við sangskrivingini hjá tær úti í Nósloy?

**Terji:** Tað hevur verið nokkso striltið við tí. Eg veit ikki hví. Eg trúði, at tá eg kom til Nólsoyar, so kom alt bara leypandi til mín; at inspiratiónin mundi fara at vera øgilig. Tað hevur hon kanska eisini verið fyri so vítt, men upp á ein annan máta, meira menniskjalig. Man brúkar meira tíð upp á at hugsa og at fáa tankarnar upp á pláss. Sinnið verður meira róligt. Eg haldi, at eg hevði verið her úti í eitt ár, áðrenn eg gjørdi nakran sang. Men eg haldi, at nú er tað líkasum komið hol á. Men sjálvandi, nú verður mesta orkan brúkt upp á húsini.

**Blaðm.:** Verður tú verandi úti í Nólsoy?

**Terji:** Ja, tað er ongin ivi um tað. So nú havi eg keypt hesi húsini úti á Krákuni í Nólsoy, og eg hevði bjóðað upp á fleiri hús áðrenn tað. Beint nú búgvi eg til leigu í einum øðrum húsum, men einaferð í mai mánaði vóni eg, at smíðingin verður liðug og at klárt verður at flyta inn.

**Blaðm.:** So hetta er tann stóra etableringin?

**Terji:** Nólsoy er mín addressa, inntil eg doyggi. Men man skal sjálvandi ongantíð siga, at man verður verandi á einum stað restina av lívinum. Men eg síggi fyri mær, at soleiðis verður tað. Í øllum førum fari eg at eiga hetta matriklið restina av lívinum. Kanska fari eg okkurt annað stað eitt ár ella tvey, men eg fari altíð at koma aftur til Nólsoy. Hetta verður basin restina av lívinum, ongin ivi um tað.



Útróðrarmenn úr Nólsoy:

# – Russar oyðileggja okkara goggu


*Útróðrarmaðurin Rúni Poulsen sigur, at gogga er nógv tað besta agnið, og tískil er tað sera óheppið, at teir eru fyri stórum missi orsakað av stórum skipum, sum liggja á fjørðinum*

**Rúni Poulsen, útróðrarmaður, er ónøgdur við russisku skipini, sum liggja fyri akkeri uttanfyri Nólsoynna. Tá Rúni og aðrir útróðrarmenn úti í oynni royna eftir goggu, sum teir brúka til agn, kunnu teir nevniliga ikki vænta at fáa allar glúparnar inn aftur, tí russar fara avstað við teimum**

ÚTRÓÐUR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Útróðrarmenn í Føroyum eru mest sum samdir um, at goggan er tað besta agnið, tá roynt verður eftir toski. Nógv arbeiði stendst burtur úr at fáa gogguna til vega, tí glúpar skulu setast á goggumið, standa har eina løtu, og síðani dragast inn aftur. Hetta fer við nógvari tíð hjá útróðrarmanninum, men eyka inntøkan er verd ómakin.

Og tó, hjá nólsoyingum fer nógv av hesum arbeiðinum til spillis, tí tá glúparnir skulu dragast inn aftur, eru teir ofta vekk. Orsøkin er ikki stuldur, men ósketni úti á fjørðinum, har russar ofta draga akkerið upp, lora niður aftur, og liggja so og draga eftir botninum við akkerinum. Og tað er júst tá akkerið verður drigið eftir botninum, at nógvir gogguglúpar verða skræddir upp og fara fyri onki.

- Teir liggja ongantíð í frið, russararnir. Teir draga upp, og so koyra teir niður aftur. Eg misti seks glúpar nú ein dagin, og eg havi mist einar 30-40 glúpar henda mánaðin. Tað verður so nógv arbeiði burturúr, og vit fáa ikki so nógva goggu frammanundan, so tað er ógvuliga óheppið, sigur Rúni Poulsen.

Rúni leggur aftrat, at tað vísir seg, at russar hava fyrimun her í Føroyum.

- Eg rokni ikki við, at russar høvdu góðtikið hetta har eysturi, sigur ein ónøgdur Rúni Poulsen.

Spurdur um teir ikki kundu sett gogguglúparnar longur inn ímóti Nósloynni, sigur Rúni, at tað nyttar ikki.

- Tað er ongin gogga at fáa inni við land. Vit mugu longur út, so har er onki at gera, sigur Rúni Poulsen, útróðrarmaður.

Tað er Tórshavnar Havn við Havnarskrivstovuni, sum hevur ábyrgdina av at geva russum boð um, hvat teir skulu liggja á fjørðinum.

- Vit hava roynt at tosa við teir á Havnar-skrivstovuni, men har spyrst onki búrturúr. Vit hava ringt nakrar ferðir, men tað er tað sama. Teir skylda bara upp á hvønn annan har inni. Vit hava eisini ringt til Skipafelagið nakrar ferðir, men tað hevur heldur ikki givið úrslit, sigur Rúni.

Spurdur um teir ikki sjálvir kunnu seta seg í samband við russar, og fáa tingini avgreidd, sigur Rúni, at tað er eingin gongd leið.

- Vit duga ikki russiskt, so tað ber ikki til. Mann kann sikkurt siga "njet" við teir, men eg hugsi ikki, at tað fer at vika skipini, sigur ein skemtandi, men ónøgdur Rúni at enda.

Árni Dam, umboðsmaður hjá russum:

# – Ikki bert russar sum oyðileggja

**Árni Dam av Skipafelagnum, sum er umboðsmaður fyri tey russisku skipini, sum koma til Føroya, sigur í samband við klagurnar hjá útróðrarmonnum í Nólsoy, at onnur skip liggja eisini og draga og skræða við akkerinum**

ÚTRÓÐUR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Aðrastaðni á síðuni stendur at lesa, at nólsoyingar hava trupulleikar av, at stóru russisku skipini liggja fyri akkerið uttanfyri Nolsoynna, tí tey fara avstað við gogguglúpunum, tá akkerið tekur í. Men Àrni Dam, russiskur umboðsmaður, sigur í hesum sambandi, at tað eru skip av øllum úr øllum tjóðum, ikki bert russar.

- Vit sóu sjálvir, tá Christian í Grótinum dró akkerið eftir botninum og sleit ein heilan kaðil út til Nólsoynna. So tað eru ikki bert russar, sum draga eftir botninum, sigur Árni Dam.

Spurdur um russisku skipini ikki kundu ankrað aðrastaðni enn júst har, sum útróðrarmennirnir royna eftir goggu, sigur Àrni Dam, at skipini eru so stór, at tað er óðamannaverk at sigla ímillum hesar smáu boyurnar.

- Hesi skipini eru kanska einar 130 metrar til longdar, og við so stórum skipi er ógjørligt at koma uttanum hesar smáu boyurnar, sum liggja ógvuliga tættar. Harumframt hava boyurnar ikki ljós á um næturnar, og tá eru tær ikki til at síggja, sigur Àrni Dam.


*Árni Dam er umboðsmaður hjá russum í Føroyum*

Árni Dam sigur seg hava prátað við russar um júst henda trupulleika við gogguglúpunum hjá nólsoyingum, so teir vita av tí.

- Men tá ættin er landsynningur, so vera teir noyddar at leggja seg undir Nólsoynna, og tá er skjótt at koma ov tætt at útgerðini hjá útróðrarmonnum, sigur Árni Dam.

Tað er Havnarskrivstovan, sum hevur ábyrgdina av at leggja skipini, tá tey hava brúk fyri at ankrað. Men tað er ikki altíð, at skipini geva boð frá sær, tá tey flyta seg, um eitt nú ættin skiftir. Tað ásannar Árni Dam, men hann vísir á, at hann fær onki gjørt við henda trupulleika.

- Tað er Havnarskrivstovan, sum umsitur hetta økið, sigur hann.

Av Havnarskrivstovuni siga teir, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki, sum teir hava vitað av leingi. Tískil stendur trupulleikin við.

Móttøka

1. apríl 2004
verður leiðaraskifti
á deild okkara í Klaksvík.


HANUS HEINESEN


HANS PETER CLEMENTSEN

Í hesum sambandi bjóðar bankin viðskiftafólki, starvsfólki, vinum og kenningum at støkka inn á gólvið at heilsa uppá fráfarandi leiðaran Hanus Heinesen og nýggja leiðaran Hans Peter Clementsen.

*fríggjadagin 2. apríl*
*frá kl. 14.30 til kl. 16.00*

FØROYA BANKI

